# Tey fingu samband

**Norsku hjúnini, sum fríggjadagin vendu sær til Sosialin fyri at fáa samband við teir menninar, ið vórðu tiknir upp av einum norskum skipi í 1967, hava fingið nakrar áheitanir frá tvøra-fólki, ið halda seg kenna til hendingina**

NORSK HJÚN
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*



*John og Hilde Edelston hava fingið áheitanir frá fólki, ið halda seg kenna til ta umrøddu hendingina*

*Mynd: Bárður Lydersen*

Í blaðnum fríggjadagin høvdu vit eina áheitan frá einum norskum hjúnum, John og Hilde Edelston, Hilde er tó fødd Sundgot.

Tey vildu fegin koma í samband við tveir menn, ið vórðu tiknir upp av norska skipinum Dragholm í 1967. Unglingarnir, ið tá vóru 16 og 21 ára gamlir, vóru farn-ir at skjóta fugl, men fingu motorstegð.

Tá ungu menninir ikki komu afturíaftur, var leiting sett í verk. Og tað var manningin umborð á norska skipinum, ið fekk eyga á lítla bátin, tá teir báðir umborð høvdu fest eld í eina skipstroyggju, ið teir høvdu dýggjað undir í bensini.

Faðir Hilde, Henry Sund-got, átti skipið Dragholm, og hann var sjálvur við hendan túrin. Skipari var Harald Fiskerstrand.

Hendingin var umrødd í einum norskum blað, men norsku hjúnini funnu einki skrivað um hendingina í føroyskum bløðum frá tí tíðini.

## Fleiri áheitanir

Síðan hendingin varð um-rødd í Sosialinum, hava fólk, ið halda seg hava vitan um hendingina, vent sær til Hilde Edelston.

- Eg havi fingið tvær áheitanir frá fólki, men talan er ikki um somu menninar, ið hesi fólk um-røða. Tí eru vit spent, um vit fara at fáa samband við røttu menninar, segði Hilde, áðrenn hon helt leið-ina aftur til Noregs mána-dagin við manni sínum.

Ein áheitan er komin úr Danmark, har ein kvinna heldur, at talan er um faðir og farbróðir sín. Hesir báðir eru tó ikki í Føroyum í løtuni, og kunnu tí ikki vátta hendingina enn. Ein onnur áheitan gongur uppá, at talan er um tveir mans, harav annar er farin hiðani, og hin er staddur í Dan-mark.

- Vónandi finna vit fram til røttu menninar, sigur Hilde Edelston.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 25, 2005
www.kaupthing.fo

# Oljuprísurin setir met

MARKNAÐARRÁK

Prísurin á Brentolju fór í farnu viku upp um 57 dollarar fyri tunnuna, og tað er nýtt met. Oljupřís-urin er hækkaður at kalla út í eitt seinasta mánaðin, og er nú 23% hægri enn fyri einum mánaða síðani. Íleggjarar óttast, at olju-framleiðararnir ikki fara at klára at nøkta tørvin á brenniolju í vetur. Ófriður í Nigeria eigur eisini sín part av skuldini. Hækkandi oljuprísurin er ein enn størri trupulleiki í Evropa enn í USA, orsakað av, at evran eisini er viknað nógv hendan seinasta mánaðin, so oljuprísurin er hækkaður heili 27% mátað í evrum.

## Lánsbrævarenturnar hækkaðar

Lánsbrævarenturnar brutu lækkandi gongdina í farnu viku. 10-ára danska rentan hækkaði frá 3,1% til 3,3%. Hetta er fyrsta vikan síðani mars, at vit hava sæð eina rentuhækking. Búskaparliga støðan í USA og Evropa er tó ikki broytt tað stóra seinasta mánaðin, og vit vænta at renturnar fara at lækka aftur innan alt ov leingi.

## Atlantic Petroleum góða byrjan

Atlantic Petroleum varð sum kunnugt skrásett á ICEX og VMF í farnu viku. Marknaðurin var afturlatin fríggjadagin, men hósdagin vóru partabrøvini í Atlantic Petroleum hækkaði í 360 ella 35% sammett við sølu-kursin 265 í desembur. Oljuprísurin, sum í løtuni liggur á methøgum stigi, økir um virðið á felagnum. Tá felagið samstundis hev-ur ment fleiri av virkis-økjum sínum síðani desem-bur, metir Kaupthing, at kursurin á Atlantic Petrole-um eigur at hækka enn meira. Sostatt er Atlantic Petroleum framvegis eitt gott keyp á kursinum 360.

## Hesa vikuna

Hendan vikan verður sera friðarlig, tá tað ræður um lyklatøl. Tískil er líkt til, at m.a. oljuprísurin verður í andglettinum. Partabræva-marknaðirnir hava enn ikki givið sær far um høga olju-prísin, men nú Brentoljan hevur sett nýtt met kann roknast við, at sjóneykan aftur verður vend oljuni. Sum heild eigur høgi olju-prísurin at trýsta lánsbræva-renturnar niður og tálma partabrævagongdini. Hetta er tó ikki galdandi fyri oljutengd partabrøv, ið standa seg væl, tá olju-prísurin er høgur og hækkar.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 606,03 | -1,3% | ↓ |
| JPY | 5,58 | -1,3% | ↓ |
| GBP | 1.109,54 | -0,3% | ↓ |
| NOK | 94,35 | -0,6% | ↓ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 103,83 | -0,5% | ↓ |
| Evru Lánsbrøv | 175,19 | -0,9% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 94,30 | 1,9% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 65,86 | 1,7% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*